Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 16. september 2013**
Journalnr.: 13/00269-5

Til móttakaran á viðhefta yvirliti

**Uppskot til kunngerð um útveiting (outsourcing) av týðandi virkisøkjum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um útveiting av týðandi virkisøkjum* til hoyringar. Sí viðhefta fylgiskjal.

Endamálið við kunngerðini er at tryggja, at Tryggingareftirlitið kann føra eitt meiri virkisført eftirlit við útveitingarvirkseminum hjá tryggingarfeløgunum. Reglurnar hava sín uppruna í altjóða standardum, og er uppskotið til kunngerð meinlíkt Finanstilsynets bekendtgørelse nr. 1304 af 25/11/2010 om outsorcing af væsentlige aktiviteter.

Í kunngerðini eru ásetingar um ábyrgd og eftirlit hjá útveitingarfelagnum við teimum útveittu uppgávunum. Kunngerðini ásetir hvørji minstukrøv útveitingarfelagið skal seta veitaranum, tá ið ein útveitingaravtala verður gjørd. Útveitingarfelagið skal, í seinasta lagi 8 gerandisdagar aftaná, at útveitingaravtala er gjørd, boða Tryggingareftirlitinum frá hesum. Tryggingareftirlitið kann krevja, at útveitingarfelagið tekur aftur útveittu uppgávuna, ella at uppgávan verður útveitt til ein annan veitara, um avtalan ella partarnir ikki halda ásetingarnar í kunngerðini.

Kunngerðin um útveiting av týðandi virkisøkjum verður eftir ætlan sett í gildi 1. november 2013.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. oktober 2013. Viðmerkingar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur E. Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein